# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Politikkurin hjá Barrack Obama tykist sera óbúgvin, og tey vøkru orðini tykjast innihaldsleys*

*Nicolas Sarkozy samb. ísraelskum blaði*

# Rentulækkingin virkaði

**Avgerðin hjá amerikanska tjóðbankanum at lækka rentuna hevur havt jaliga ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar kring heimin, og fleiri rentulækkingar eru á veg**



Tann góða gongdin á virðisbrævamarknaðunum í Evropa í gjár helt fram í dag, og serfrøðingar ivast ikki í, at tað var avgerðin hjá amerikanska tjóðbankanum at lækka rentuna eitt hálvt prosentstig, sum er orsøkin. Samstundis verður roknað við, at Evropeiski Miðbankin fer at lække sína rentu í næstu viku, og at tjóðbankar í Japan og aðrastaðni fara at gera tað sama.

- Rentulækkingin fer at geva meiri støðug viðurskifti á marknaðinum kring heimin, og vit vænta eisini, at hetta verður galdandi her hjá okkum, sigur Anders Matzen, greinari hjá Danske Bank, við danska kringvarpið.

Dagurin í gjár royndist sera væl á marknaðinum í Keypmannahavn, og longu frá byrjanini í morgun hækkaði virðið á teimum flestu partabrøvunum. Hjá teimum størstu fyritøkunum var talan um hækkingar um 3,0 prosent, men hjá summum so sum bryggjarífyritøkuni Carlsberg og vindmyllufyritøkuni Vestas var hækkingin millum 7,0 og 9,0 prosent. Tað skal tó sigast, at júst hesar báðar fyritøkurnar hava verið í sera ringum sjógvi á marknaðinum í seinastuni.

## Eusini eystanfyri

Á virðisbrævamarknaðinum í Tokyo hækkaði Nikkei-vísitalið longu frá byrjanini í nátt 3,25 prosent, og tá marknaðurin lat aftur í morgun, var hækkingin komin upp á 9,96 prosent.

Í Hongkong hækkaði partabrævavirðið 6,9 prosent í nátt, og á marknaðinum í Suðurkorea kom hækkingin heilt upp á 11,0 prosent.

Harafturímóti var hækkingin ikki so stór á marknaðunum í Shanghai og Singapore. Har hækkaði vísitalið ávikavist 2,0 og 2,5 prosent.

## STUTT SAGT

### Duldarfullur ringur á luftini

Nógvir bilførarar á Reykjanesi í Íslandi bremsaðu, tá tá fyrradagin fingu eyga á ein løgnan ring uppi á luftini. Fólk, sum vóru til gongu á leiðini, steðgaðu eisini á og stardu at hesum løgna fyribrigdinum.

Onkur gitti ivaleyst, um Ísland mundi hava fingið vitjan uttaneftir úr rúmdini, men so var ikki. Fjølmiðlarnir vistu at siga, at ringurin var roykur, sum stavaði frá einari trygdarvenjing, sum trygdar- og bjargingartænastan á altjóða flogvøllinum í Keflavík hevði havt. Millum annað høvdu teir sprongt eitt ella annað í luftina, og tað var haðani, at roykringurin kom, skrivar Morgunblaðið.



*Roykringurin uppi yvir Reykjanesi*

*Mynd: Morgunnlaðið*

### Bankastjóri í geglið

Ein fyrrverandi tjóðbankastjóri í Indonesia varð í gjár dømdur fimm ára fongsul fyri svik og figgjarundandrátt fyri 11 milliónir amerikanskar dollarar. Sambært dóminum brúkti hann ein part av pengunum til at mutra nakrar politikarar.

Tann 60 ára gamli Burhanuddin Abdullah var stjóri í indonesiska tjóðbankanum frá 2003 til mai í ár, tá hann noyddist at fara frá, tí ákæruvaldið kannaði skuldsetingar ímóti honum. Endin varð, at Burhanuddin bleiv ákærdur fyri at hava tikið 11 milliónir dollarar úr einum grunni hjá tjóðbankanum, og at hann í minst tveimum førum hevði mutrað tveir tingmenn.

Hesir báðir sita nú í indonesisku stjórnini, skrivar AP. Annar teirra er sum skilst verfaðir indonesiska forsetan, men tað er ikki greitt enn, um ákæruvaldið fer longri við málinum.

Umframt tey fimm árini í fongsli skal fyrrverandi tjóðbankastjórin rinda 22.500 dollarar í bót. Hann boðaði alt fyri eitt frá, at hann var ósekur, og at hann ætlaði sær at kæra dómin.

# 25 flogfeløg rúka afturat í ár

Ein svenskur loftferðsluserfrøðingur væntar, at umleið 25 flogfeløg fara á húsagang í hesum árinum

Sambært Anders Lindman er Sterling Airways ikki tað einasta flogfelagið, sum er komið í so ringan sjógv, at tað nmoyðist at gevast við virkseminum. Við Aftonbladet sigur svenski loftferðsluserfrøðingurin, at tað eru alt ov mong flogfeløg, men at fíggjarkreppan fer at gera, at fleiri teirra verða noydd at gevast.

Anders Lindman er ikki tann einasti, sum væntar fleiri húsagangir í loftferðsluni. Espen Andersen á norska Handilsháskúlanum sigur við norsk bløð, at fleiri flogfeløg hava stórar trupulleikar í hesum døgum.

- Feløgini hava lítlan og ongan vinning, og fleiri teirra fáa hjálp til at draga andan, sigur Espen Andersen við Aftenposten.

Anders Lindman og Espen Andesen siga, at tað kom ikki óvart á teir, at Sterling noyddist at seta síni flogfør. Millum feløgini, sum eftir øllum at døma fáa somu lagnu, eru eitt nú Olympic Airways og Alitalia.



# Tosaði fyri eina millión um minuttin

Barrack Obama brúkti 30 milliónir krónur til 30 minuttir í amerikonskum sjónvarpi í nátt, og so nógvar pengar hevur einki annað forsetavalevni brúkt upp á so stutta tíð fyrr. Sendingin, sum var ein reklamufilmur, var í bestu senditíð, og serfrøðingar eru á einum máli um, at hon var sera væl fyriskipað. Tann stóri spurningurin er, hvønn týdning hon fær á valið. Heldur óvæntað nevndi Obama ongantíð mótstøðumannin John McCain, men brúkti heldur teir 30 minuttirnar til at lýsa seg og sínar ætlanir.